# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

*»Ísraelska framferðin í Libanon er óneyðug valdsnýtsla«*

*(Per Stig Møller, uttanríkisráðharri).*

## STUTT SAGT

### Rýmdi frá doyggjandi manni

Fyri nøkrum árum síðani misti nýsælendingurin Mark Inglis bæði beinini orsakað av frostsárum frá einari miseydnaðari ferð niðan á Mount Everest. Læknarnir noyddust at taka beinini niðan fyri knæ, men kortini eydnaðist tað fyri tveimum mánaðum síðani Mark Inglis at fullføra tann gamla dreymin um at sleppa upp á heimsins hægsta fjall.
Ferðin vakti stóran ans, og Mark Inglis fekk nógv rós fyri bragdið. Men nú er komið fram, at Mark Inglis fór frá einum doyggjandi manni á ferðini niðan á fjallið. Talan var um ein 34 ára gamlan breta, sum æt David Sharp, ið var vorðin so útlúgvaður og kaldur, at hann orkaði valla at standa á beinunum. Hann varð seinni funnin deyður.
Tað er próvfast, at Mark Inglis tosaði við David Sharp, og Mark Inglis hevur greitt frá, at hann boðaði øðrum frá tí illa stadda bretanum, áðrenn hann sjálvur helt leiðina fram niðan fjallið. Men í gjár noyddist hann at viðganga, at tað gjørdi hann ikki.
Tilburðurin hevur vakt stóran ans, tí tað hevur altíð verið ein óskrivað regla, at menn, sum royna at sleppa niðan á Mount Everest, hjálpa øðrum, sum koma illa fyri á ferðini.

### Atkvøddu aftur um samkynd

Í USA hava politikararnir aftur umrøtt viðurskiftini hjá samkyndum og teirra støðu í samfelagnum.
Hesaferð viðgjørdi Umboðsmannatingið eitt uppskot um landsumfatandi forboð ímóti, at samkynd kunnu ganga saman í hjúnarlag. Eitt tílíkt uppskot krevur, at tveir triðingar av tingmanningini atkvøða fyri, men tá atkvøtt varð, fekk uppskotið 236 atkvøður, meðan 187 atkvøddu ímóti. Hetta er aðru ferð síðani 2004, at eitt tílíkt uppskot verður felt í Umboðsmannatinginum, men uppskotsstillararnir siga, at teir fara ikki at gevast so.
27 republikanskir tinglimir atkvøddu ímóti uppskotinum hesaferð, og teir siga, at teir fara ikki at broyta støðu til spurningin um hjúnarlag millum samkynd. Fleiri demokratiskir tinglimir finnast at teimum republikonsku uppskotsstillarunum og leggja teir undir at elva til spjaðing millum fólk.

### Pávin skrivar bók

Benadikt pávi 16. heldur summarfrí uppi í teimum italsku alpunum, so hann kann fáa frið til at skriva eina bók um Jesus, skrivar AP úr Rom.

Blaðið La Republica skrivar, at bókin er ætla tí vanliga fólkinum, og at pávin fór undir at skriva hana, tá hann hevði tikið við embætinum í apríl í fjør. Hetta er ikki fyrsta bókin hjá pávanum, sum hevur verið ein virkin høvundur, líka síðani hann arbeiddi sum guðfrøðiprofessari í Týsklandi.

Pávin situr kortini ikki við skriviborðið allan dagin. Nú um dagarnar gjørdi hann eitt rend inn um sveisiska markið, har hann nýtti høvi til at vitja eitt gamalt kleystur, skrivar AP.

# Ísrael bumbar sivilmál í Libanon



**Ísraelska herleiðslan sigur, at álopini á Libanon fara at halda fram 14 dagar afturat.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Síðani Ísrael fór undir at bumba mál í Libanon, hevur ísraelska stjórnin sagt, at endamálið við álopunum var at raka støðir hjá Hizbollah og at forða felagsskapinum at søkja at málum í Ísrael.
Men altjóða tíðindastovurnar bera dagliga tíðindi um, at Ísrael søkir eisini at sivilum málum í Libanon. Eitt nú visti Reuters í morgun at siga, at ísraelsk flogfør høvdu bumbað eina bygd uttan fyri býin Tyr, og at fleiri sivilfólk høvdu latið lív. Í gjár frættist, at bumbur høvdu rakt eitt íbúðarøki, og at tíggju fólk, teirra millum kvinnur og børn, vóru deyð. Sambært libansku myndugleikunum eru 41 fólk deyð í ísraelsku álopunum tað seinasta samdøgrið.

**Eisini neyðhjálp**

Franska tíðindastovan AFP skrivar í dag, at ísraelsk flogfør hava bumbað fýra lastbilar, sum vóru á veg ígjøgnum Beka-dalin við mati og heilivági. Ísraelska herleiðslan upplýsti, at lastbilarnir vóru komnir úr Sýrialandi við vápnum og lóðuri til Hizbollah, men AFP-tíðindamaðurin, sum var á staðnum beint eftir álopið, sigur, at har vóru hvørki vápn ella lóður.
Hetta er ikki tað einasta álopið av hesum slagnum, tí sambært turkiskum diplomatum bumbaðu ísraelsk flogfør í gjár ein turkiskan lastbil, sum kom við matolju.
Fleiri lond hava funnist at ísraelsku álopunum. Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, segði í gjárkvøldið, at Ísrael nýtir óneyðuga harðliga framferð í Libanon.
Ísraelska herleiðslan sigur, at álopini á Libanon fara at halda fram.
-Tað fer at taka einar 14 dagar afturat at røkka teimum málum, sum vit hava sett okkum, segði talsmaðurin hjá herinum í gjár.

# Nútímans trælahald í Evropa

**Italska løgreglan hevur funnið 113 polskar arbeiðsmenn, sum búðu í einari legu, ið minti mest um týningarlegurnar undir seinna heimsbardaga.**

ITALIA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Teir 113 pólendingarnir høvdu sæð eina lýsing í polsku bløðunum, har søkt varð eftir fólki til at arbeiða í italska landbúnaðinum. Teir søktu, og tá teir høvdu goldið lýsaranum millum 1.000 og 2.000 krónur hvør, fingu teir arbeiðið.
Men arbeiðsumstøðurnar í Puglia vóru ikki tær, sum teir polsku arbeiðsmenninir høvdu væntað. Teir vórðu stúgvaðir saman í smáum rúmum uttan ljós, hita ella nakað at matgera við, og rundan um leguna gingu vápnaðir vaktarmenn úr Ukraina, Pólandi og Italia á varðhaldi.
-Hetta minnir mest um tær nazistisku týningarlegurnar undir seinna heimsbardaga. Menninir vóru ikki bara arbeiðsmegi, men trælir, sigur Piero Grasso, ið hevur staðið fyri arbeiðinum hjá italsku løgregluni at avdúka málið. Hann vísir á, at teir polsku arbeiðsmenninir vórðu noyddir at arbeiða 15 tímar um samdøgrið, og at tímalønin lá millum 16 og 30 krónur. Maturin var lítið annað enn vatn og breyð, og vóru menn sjúkir, máttu teir gjalda 160 krónur í bót. Menninir sluppu heldur ikki heimaftur.